# Jensina við fløgu

Jensina Olsen kemur í hesum døgum út við síni fyrstu fløgu, »eitt sindur av tí bláa«. Í samband við útgávuna verður almenn móttøka í TUTL á Káta Horninum hósdagin 20.november, klokkan 15.00. Fløguútgevin spælir nøkur løg og fløgan verður formliga útgivin. Nýggja fløgan, ið verður útgivin av TUTL, er fyrsta tónleikaútgávan, har Jensina sjálv stendur fyri so at siga øllum. Hon syngur og spælir gittara, eins og hon sjálv hevur gjørt orð og løg. Hon hevur eisini fingið hjálp frá tónleikarunum Leivur Thomsen, Rógvi á Rógvu, Michael Blak og Finnur Hansen, sum eisini stendur fyri upptøkum, ljóðblanding og mastering av fløguni. Á nýggju fløguni »eitt sindur av tí bláa« eru 10 løg. Útgávukonsert verður í Reinsarínum hóskvøldið klokkan 20.00.




# Miusa Dagbók komin út

Nýggj barnabók komin í bókhandlarnar. Talan er um »Miusa Dagbók« eftir Thomas Michael Smith. Innihaldið snýr seg um, hvussu dagarnir ganga hjá fýra ára gamlari smágentu saman við abbanum, teir gott fjúrtan dagarnir her í Føroyum, meðan foreldrini eru til próvtøku í Danmark. Tekstin hevur høvundurin sjálvur skrivað, meðan tær nógvu tekningarnar hava abbadótturin og abbin teknað hvør sær og í felag. Bókin er til tey fýra til átta ára gomlu og fæst nú til keyps í bókhandlunum kring landið. Hon kostar 175 kr.




*Íslendski útgevarin Halldór Pállson gevur nú út bókasettið West Norden við bókum um Ísland, Føroyar, Grønland og Hetland*

# Bókasett bindur Útnorður saman

**Spildurnýtt bókasett varpar ljós á felags eyðkennini við útnorðurlondunum Íslandi, Føroyum, Grønlandi og Hetlandi**

BØKUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Londini í Útnorðuri hava munandi meir í felag, enn vit geva okkum far um. Tað heldur íslendski útgevarin Halldór Pállson, sum nú gevur út eitt samlað sett við bókum um Ísland, Føroyar, Hetland og Grønland.

Endamálið við útgávuni er at geva skúlabørnum og lesarum annars í hesum londum høvi at læra meir um síni nærmastu grannalond. Í Íslandi og Hetlandi hava skúlar tikið sera væl ímóti bókunum, og nú vónar útgevarin, at eisini skúlar í Føroyum fara at fáa gagn av teimum.

## Felags eyðkenni

Halldór Pállson er í hesum døgum í Føroyum í sambandi við at bøkurnar nú koma út her heima. Pállson vísir á, tað er ikki av tilvild, at júst Føroyar, Ísland, Hetland og Grønland eru umboðaði í nýggja bókasettinum. Sambært honum hava júst hesi fýra londini í Útnorði serliga nógv í felag.

- Hesi londini eru øll smáar fiskivinnutjóðir, ið liggja rættiliga avbyrgdar, og har náttúran sum heild hevur ein týðandi leiklut, sigur Pállson, og leggur afturat, at av hesum londunum líkjast Føroyar og Ísland kanska serliga nógv.

- Í báðum londunum ræður ein veiðimentan, sum ger, fólk eru noydd at taka skjótar avgerðir. Í londum, har fólkið er so bundið at fiskivinnuni og náttúrini annars, ber ikki til at bíða eftir alskyns fundarsamtyktum, áðrenn man sleppur í gongd. Tí er tað eitt eyðkenni fyri bæði íslendingar og føroyingar at vit handla skjótt, sigur Halldór Pállson.

Í sambandi við at bøkurnar nú verða givnar út sum bókasett, eru allar upplýsingarnar um londini dagførdar. Hetta hevur havt stóran týdning fyri útgevaran, sum ynskir at tryggja eitt høgt trúvirði í útgávuni.

Útgávan verður løgd fram í Miðlahúsinum ein av komandi døgunum.

# Passiónin í dýpinum

**Við kærleika tekur hann sínar myndir í bláa dýpinum fyri at fortelja okkum staklum uppi á turrum um einar Føroyar, sum vit ikki vistu, vóru til, sigur Ole Wich millum annað um framsýningina "Ókendu Føroyar" hjá kavaranum og myndamanninum Inga Sørensen**

UMMÆLI

*Ole Wich*

Jeg har kendt Ingi Sørensen i mange år, helt tilbage til da han stod på scenen i Havnar Jazzfelag og fyrede den af på guitar, passioneret som altid.

Jeg mødte ham på gaden for en hel del år siden. Da var han begyndt at dykke. Husker stadig hans begejstring, når han fortalte om følelsen af at svæve ned gennem dybet og om den kropsrystende oplevelse, når han lå på bunden udenfor havnemundingen under dykning til Lincoln City vraget og fornemmede Smyril passere til havs, som en mørk rumlende tordensky over hans dykkermaske.

Jeg mødte Ingi igen for et par måneder siden i de nye strømme, der nu forbinder så mange verdener i det digitale hav, den store globale bygd på Internettet.

Ingi havde lagt en stribe undervandsfotos ud på Facebook. De strømmede mig i møde, som en længe ventet drøm. Jeg kontaktede ham med det samme.

Jeg har aldrig forstået, at den store interesse, der traditionelt har været for havet her i landet, ikke har haft et billedligt udtryk. Der har været dykket i mange år omkring øerne, men det er meget få billeder, vi har set dernede fra og altid i en praktisk anledning.

Her var endelig én person, der af simpel lyst fortalte mig om den ukendte verden, jeg havde længtes efter at se i så mange år.

Vi har siden arbejdet sammen om billederne. Jeg har givet kritik, analyseret hans fotos og givet forslag til forskellige tilgange, kompositionsmuligheder og fototeknik, som han kan bruge i den meget specielle kunnen, det er at fotografere under ekstreme forhold i det lunefulde element, der omgiver os.

Ingi har et naturligt øje for motiver, han er ihærdig, men også tålmodig og i stand til at vente på sin chance, for placering og timing har alt at sige i fotografiets verden. Med sjælden passion fanger han sin fascination af den verden, han selv har været fanget af så længe.

Ingi er fotoamatør i ordets bedste betydning. Con amore tager han sine billeder i det blå dyb, for at fortælle os landbundne stakler på det tørre, om et Føroyar, som vi intet vidste om eksisterede.

Han viser os tyste panoramaer, der vrimler af liv og ekspressionistiske farveeksplosioner på en baggrund af de dybe blåtågede vandmasser, der er Føroyars største naturressource.

Nu ser vi vandskaberne for første gang og føler deres uendelige poesi og fascinationskraft. Endelig kan Ingi fortælle os om sin passion. Vi lytter med undrende øjne.



*Framsýningin "Ókendu Føroyar" hjá kavaranum og myndamanninum Inga Sørensen er at síggja í Stephanssons Hús*